·FØROYA·
SOCIAL·DEMOKRAT

FRÆLSI JAVNAÐUR BRÓÐURSKAPUR

Nr. 49. b | Lýsingaprísur fyri petitreglu: 30 oyr. á forsiðuni, 20 oyr. á 3. og 4. síðu. Við stórri lýsingum fæst avsláttur í prísinum. | Hósdag hin 8. december 1932. | Kostar kr. 1,50 fjóðringsárið + Porto. Blaðið verður bilagt á posthúsinum, brævsavnarstøðum og skrivstovuni. Telf. 143. | 6. árg.

Til Føroya fólk.

Vit sita á veljarafundi, og øll tey *sterku* orðini fara sum ein súsandi, ýlandi stormur um oyru okkara og fáa við síni mannsligheit hjørtu okkara, sum eru so vælsignað lætt móttakandi fyri *tí sterka, tí ljóðandi,* til at pipra av gleði. Og vit knýta hendurnar í lummanum, ella vit fara á fotur og rópa hurrá! og veittra við hesum somu knýttu hondunum — á ja, tað er so nattúrligt so menniskjansligt.

Men sum skrivað stendur: »Harrin var ikki í tí ýlandi storminum, hann var í tí stilla, milda fleyrinum«. Tað er ikki tey øsandi orðini, tey stóru lyftini, tað mikla orðabraskið, sum førir okkum fram á mál. Tað er tað stilla upplýsandi arbeiði, sum so við og við skal gera okkara fólk til tað, sum tað innast inni er: *socialdemokratar.* — *Men her skal tíð til.* Harri Danbjørg skal ikki føla tað sum eitt vónbrot, um hann ikki verður valdur, tað ger einki, tí »ímorgin kemur dagur aftur«, og halda vit á, verður sigurin okkara. Eina ferð kemur tann dagur, tá eisini vit eru blivnir eitt lið í tí stóru fjoldini, sum samlar seg um merki javnaðarmanna.

Meðan tað allastaðni um heimin hevur tikið ár, nógv ár, at koma so langt fram, at javnaðarmenn verða roknaðir fyri *nakað,* ja meir enn tað, sum ein *stórmakt,* mugu vit ikki falla í vónloysi, um vit enn bara eru ein lítil flokkur. *Men vit skulu halda áfram,* og vit skulu vinna ríkið, so satt sum vit ikki gevast!

Hin sociala rørslan er so púra nýggj her hjá okkum, at vit ikki kunna vænta at hava fingið nakað avrikað enn. Men við eitt ágrýtið arbeiði við tí máli fyri eyga: *at læra okkara fólk at virða seg sjálvt, og at læra tað samhald, vinna vit fram.*

Ein socialdemokratur er ikki ein maður, hvørs svorð er vent móti ollum og sum stendur við hvønnsmánns svorði vendum móti sær. Hann er ein maður sum, antin hann stendur í tí heitasta stríði ella í friðsins arbeiði, stendur sum boðberari um frið á jørð, um frælsu fyri tey bundnu og um sama rætt fyri øll til at nýta tað góða, lívið er ætlað at geva okkum ollum. — Tí hann er ein stríðsmaður í *tí* frælsarherinum, sum fer út í stríð fyri rættvísi, friði og kærleika her á jørð. Her stríðist ikki við hvossum vápnum, spreingiknottum og forgiftugari luft, her berst ikki oyðileggíng út um lond, *her* er stríðið andans stríð. — Falla tó enn orðini mangan hvøss og hørð, verður mótstøðumaðurin tíðan dálkaður og hildin fyri gjoldur — ja, so er tað tí, at enn eru vit ikki komin á mál; her er enn so nógv av tí ljóta, sum ov leingi verður at hanga við eina sak, hvussu góð hon er. —

Vit fata sera væl, at tann stóra mongdin her á landi stendur ófatandi yvir fyri javnaðarhugsanini, hon er, sum áður sagt, so nýggj. — Her hava nú síðan 1906 verið tveir flokkar: samband og sjálvstýri, og um teir samlast enn størsti parturin av okkara fólki. Tá veljarafundur er, verður tað so teir báðir flokkarnir, sum taka valdið á fundinum, sjálvt um tað so er ein javnaðarmaður, sum »eigur« fundin. — Alt hetta fata vit sera væl, soleiðis er tað enn, og verður væntandi eina langa tíð afturat — — — men sum sagt er: »Hver Djævel har sin Tid«. Sambands- og sjálvstýrisflokkarnir hava haft og hava menn á tingi, bæði løgtingi og danatingi, og teir eru »drívnir« í politiskum orðadrátti og deilast sum »tingstútar«, sum Holberg sigur. — Men vit hava hug til at siga við teir tey orð, sum sami Ludvig Holberg sigur: »Gaa hjem og forlig jer, I Skabhalse«. — Tí vit skulu siga tykkum nakað, vit hugsa, at teir báðir flokkarnir standa ikki so fjart frá hvørjum øðrum innast inni. —

Javnaðarmaðurin Johan Danbjørg var í síni talu á fundinum í Tórshøll sáttligur í síni frágreiðing. Hann helt seg tæna *síni* sak best við ikki at vera við í stríðinum samband—sjálvstýri, tað er ikki her javnaðarstoðan er. Við at møta sum javnaðarmaður — um hann varð valdur — meinti hann at gagna Føroyum best, tí ríkisstýrið er javnaðarsinnað, og ein javnaðarmaður má tí hava betri møguligheitir fyri at finna »gehør« hjá teim stýrandi, enn ein vinstrimaður, sum stendur í tí flokki, javnaðarstýrið metur sum argastu mótstøðumenn sínar, ella ein sjálvstýrismaður, sum stendur uttanfyri allar flokkar, púra einsamallur. —

Ja, her er tað at knúturin er: Peningaliga sað — og tað tykist fyri okkum tíverri at vera einasta hugsan — hevur ein javnaðarmaður mangar, mangar ferðir tey bestu líkindi til at gera nakað, og tí kunnu øll tey, fyri hvørjum tey peningaligu viðurskiftini eru tað einasta, ikki gera betri, ella rættari sagt **nakað annað,** enn at velja javnaðarmannin. — Tí mugu øll fara á val, hvør á sínum plássi, og seta ein kross við navnið Danbjørg — — ja, sig mær, **hvat** annað skulu tit gera?? Her er jú fyri tykkum eingin annar vegur!

Nú sigur møguliga onkur við okkum: »Tygum skriva so spoyskliga um pening, er tað kanska pening vit krevja ella biðja um, tá vit krevja Grønland opið fyri okkum?« Vælsignaður verði tú maður, er tað ikki til at fiska, tú fert hagar upp og stríðist og baksar í veðri og óveðri, og gevur meiri fiskur ikki meiri pening? *So, um tað ikki er peningur frá tí danska statinum, so er tað tó peningur — og peningur er nú einaferð peningur!*

Tað er at vóna, at tað einaferð eydnast danska ríkisstýrinum at fáa eyguni upp og síggja tað rangvørga, og móti allari fríari javnaðarhugsan stríðandi í, at halda uppi, í tjúgundi øld, eitt tilíkt stýri sum tað í Grønlandi. Einki land um allan heimin kennir nakað sovorðið, og fyri tí er einki forsvar møguligt; her eru allir vitugir danir á einum máli, so stýrið má hava *eina grund, sum er øllum monnum ókunnug.*

Her er eitt fori, hvar tað er av allarstørsta týdningi at fáa ein javnaðarmann inn á ting: Hann hevur tær treytir liggjandi á sær, *av øllum alvi, ótroyttiliga* at virka fyri hesari sak, til hon er komin á mál.

Lat okkum so øll fara á val og seta kross við Danbjørg, so hava vit gjørt okkara skyldu, og so krevist ikki meiri av okkum.

Til veljararnar.

Hin 12. december verður val av einum fólkatingsmanni fyri Føroyar. Stjórn javnaðarflokksins hevur biðið meg um at bjóða meg fram sum valevni. Eg takki stjórnini fyri tað álit, ið mær á henda hátt er sýnt, og eg takki teim æraðu javnaðarmonnum víða hvar um landið, ið eru stillarar mínir.

Nú ræður bert um at sigra á valdegnum; men sjálvandi verður kampurin harður.

So statt heiti eg hervið á teir æraðu veljarar og biði teir um at styða meg á valdegnum.

Tíðint hoyra vit menn fora fram, at eingir kapitalistar eru í Føroyum. Hetta er ikki heilt beint; men tó áttu teir at verið tann minni flokkurin, og javnaðarmenn áttu at verið í stórum fleirtali her á landi; tí fjoldin av Føroyingum eru fátækir arbeiðsmenn, fiskimenn, træðarmenn o. s. fr.

Men tíverri, tað er ein sterkur andi, ið berjist ímóti javnaðarrørsluni. Tað er ein illur andi, sum eitur kapitalistandin. Hesin andi er tann, ið leggur býir og lond í kalda kol, meiðslar og drepur menn og kvinnur og børn — stutt sagt, ger verðina so vorðna, at ótrygt og óhugnaligt verður at liva á hesi góðu jørð, hvar allmikið er av øllum góðum.

Í bíbilsøguni lærdu vit, tá vit vóru børn, at »Gud saa alt, hvad hann havde gjort, og se, det var saare godt.«

Kunna vit nú siga, at »alt er saare godt«?

Eg læs nú um dagirnar í einum føroyskum blaði, at 200 tús. børn í U. S. A. — bandaríkinum — ganga sum »vagabøndur« og flakka um landið, kold og svong. Er tað av tí, at einki er at føða og klæða hesi neyðars børn við?

Svarið verður nei — ovmikið er av øllum slagi. Hví eru børnini svong og kold, meðan allmikið er av øllum slagi í landinum? Jú, orsøkin er tann, at kapitalistarnir brenna kornið, kaffi, the o. s. fr., heldur enn teir unna hesum neyðars børnum at eta seg mett.

Klædnaðúðirnar eru fullar av klæðum, skógvaðúðirnar eru fullar av skóm. Hví ganga summi menniskju nakin og skóleys?

Tað er eina og aleina av tí orsøk, at kapitalistandin ræður í verðini, og tey menniskju, ið lata seg leiða av hesum illa anda, tey verða hørð, kold og hjartaleys, sum hr. P. M. Dam segði á løgtingi í ár, tá ein afturhaldsmaður bað arbeiðararnar á Tvoroyri fara at velta. Nær hava afturhaldsmenn hjálpt teim fátæku at fáa nakað at velta í?

Eg síggi í bloðunum, at ymiskir menn látast at harma tey fátæku í landinum. Men æraðu veljarar! Latið tykkum ikki blinda av slíkum monnum, sum kjúkla fyri tykkum nú, ið val stendur fyri durum, men sum aftaná valið eru svartastu afturhaldsmenn.

Eingin skal koma eystan ella vestan eftir, sum kann prógva, at javnaðarmenn vilja leggja toll á vørurnar, sum tey fátæku skulu nýta. Nei, vinir, javnaðarmenn — og eg eri ein av teimum — eru og verða mótstøðumenn av øllum tolli; men vit eru ikki sekir í tí, at afturhaldsmenn hava fort verðina út í slíkt óføri, at tollur og annað óreint og órættvíst má nýtast. Eg havi sagt, at løgtingið í februar mánað — seinasta vár — mátti skaffa lán fyri at fáa skipini út. Løgtingið fekk einki lán; tí tingið einki hevði at seta í veð. So statt skrivaði eg, at ífall tingið kundi fáa lán móti at áseta toll, so máttu vit javnaðarmenn ganga undir at áleggja toll, tó at tað stríðir móti stevnuskrá okkara. Eingin tollur varð álagdur, einki lán fekst, summi skipini lógu vegna peningatrot, og av somu orsøk máttu reiðarar selja fiskin í úrtíð, landið tapti kanska eina millión — ella meira. Hetta er sogan. Hon er sonn — men tíverri — hon er syrgjulig.

Teir menn, ið tala so hart um tollin, áttu eisini at talað og skrivað um onnur kringumstøðir, ið dýrka ta vøru, ið hin fátæki skal liva av. Hví skriva hesir menn ikki um millumhandlararnar, ið strúka av stað við tí vinningi, sum av rættum átti at fallið niður her í Føroyum? Hví skriva hesir menn ikki um tað øðiliga tap, ið land okkara líður av tí, at okkara vørur verða fluttar inn í landið í smáum førningum í staðin fyri í stórum? o. s. fr. — Nei, slíkt nevna hesir menn ikki; tí tá hetta óskilið skal broytast, so má tað kapitalistiska systemið avloysast av socialistiskari landaskipan. Tí tiga afturhaldsmenn og lata landið fara somu gomlu leið — niður á bakka.

Í »Dimmalætting« síggi eg, at afturhaldsmenn geva hr. Stauningi — ella rættari sagt tí socialistisku ríkisstjórnini — skuld fyri, at hr. A. Samuelsen ikki hevur fingið pening til Føroyar til ymisk mál, t. d. havnir, vegir o. s. fr. — Eisini í hesum máli stinga afturhaldsmenninir sannleikan undir stól. Harra A. Samuelsen saman við flokksmonnum sínum hava noktað ríkisstjórnini at áleggja skatt á ríkmenninar í Danmork; tí hevur ríkisstýrið ikki kunnað fingið tann neyðturvuliga pening í statskassan, og tí hevur ríkisstýrið ikki haft ráð at seta arbeiðir í gongd í Danmork og heldur ikki í Føroyum.

Verði eg valdur, vil eg styðja ríkisstýrið, soleiðis at skattur verður álagdur á teir, ið ráð hava at rinda skatt, og so kunna arbeiðir setast í gongd niðri í Danmork og eisini her uppi í Føroyum.

Vit javnaðarmenn vilja veita studning til gomul, sjúk og forældurleys børn o. s. fr. — Vit vilja royna at gera korini so góð sum gjørligt fyri hvønn tann einasta íbúgvara í landinum.

Eg vóni, at veljararnir styða meg á valdeginum, og so statt vóni eg, at valið verður til frama fyri Føroyar og Føroyafólk.

Við virðing.
J. H. Danbjørg.

Yvirlýsing.

Harra J. H. Danbjørg hevur biðið okkum undirritaðu hyggja í rokniskap fiskimannafelagsins hvorvítt Porkeris sókn skyldar peningur til felagið.

So statt kunnu vit votta, at Porkeris sókn einki skyldar.

Staddir í Havn 4. desbr. 1932.

H. V. Madsen. *J. J. Simonsen.*
Sjórnarlimir í F. F.

Omanfyri standandi yvirlýsing er framsett vegna lygusøgur í Norðuroya sambandsflokki.

J. H. Danbjørg.